Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór:

# – Vit fara í øllum førum at framleiða Sisu



*Á Føroya Bjór í Klaksvík og kring landið annars eru eini 40 ársverk tilsamans*

**Føroya Bjór hevur ikki somu áskoðan um lønsemi í framleiðsluni av sodavatni sum Restorff's Bryggjarí hevur. - Vit halda avgjørt, at hetta er ein framleiðsla sum loysir seg, sigur Einar Waag, stjóri**

SODAVATN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Viðhvørt hendir tað, sum tú ikki rættiliga roknar við; at kappingarneytar á ymiskum økjum keypa hvønn annan – ella partar av hvørjum øðrum.

Ikki so sjáldan hava bryggjaríini, Restorff's Bryggjarí í Havn og Føroya Bjór í Klaksvík, verið í hornatøkum í fjølmiðlunum um ymisk viðurskifti av felags áhuga.

Men síðsta fríggjadag hendi so tað, at Restorff's Bryggjarí avgjørdi at selja Føroya Bjór øll rættindi síni til framleiðslu av teimum sløgum av sodavatni, sum bryggjarríið í Havn hevur.

- Vit vórðu uppringdir av Restorff's Bryggjaríi, sum segði, at teir 1. apríl í ár fóru at gevast við at bryggja sodavatn, tí hetta loysir seg ikki hjá teimum. Teir spurdu, um vit høvdu áhuga fyri merkjunum hjá teimum. Eg segði, at eg kortini fór til Havnar seinnapartin fríggjadagin. Vit høvdu ein fund við Restorff's Bryggjarí um málið henda seinnapartin og avgjørdu at keypa rættindini til tey sløg av sodavatni, sum felagið hevur.

Soleiðis greiðir stjórin á Føroya Bjór, Einar Waag, frá gongdini í hesum máli.

- Vit hava soleiðis keypt rættindini at tappa tey sløg av sodavatni hjá Restorff's Bryggjaríi, sum vit halda, at potentialið er í.

## Sisu úr Klaksvík

Einar Waag sigur, at høvuðsmerkið hjá Restorff's Bryggjaríi er Sisu, og hann sigur, at hetta merkið fer Føroya Bjór í hvussu er at framleiða.

- Vit fara eisini at hyggja eftir, um tað kanska loysir seg hjá okkum at framleiða eitt ella tvey onnur sløg av sodavatni, sum Restorff's Bryggjarí hevur havt.

Stjórin sigur, at enn hava tey á Føroya Bjór ikki gjørt sær nakrar niðurstøður um, hvørji onnur sløg av sodavatni kundu verið áhugaverd, men hann nevnir eitt nú Peru-sodavatnið, sum kanska eisini hevur eitt potentialið.

- Vit fara so ikki at framleiða reyða og grøna slagið, sum Restorff's Bryggjarí hevur havt, tí hesi sløgini hava vit frammanundan, sigur hann.

Einar Waag sigur, at tað nýtist ikki at taka langa tíð hjá Føroya Bjór at fáa nøkur av teimum sodavatnssløgum, sum tey nú hava keypt frá Restorff's Bryggjaríi, út á marknaðin.

- Hetta kann gerast heilt skjótt, sigur hann.

## Helmingurin sodavatn

Spurdur, hvussu stórur partur av samlaðu framleiðsluni hjá Føroya Bjór, sodavatnið er, sigur stjórin:

- Eg vil meta, at sølan av sodavatni er umleið ein helmingur av samlaða umsetninginum hjá okkum.

Einar Waag vísir á, at tað slagið av sodavatni hjá Føroya Bjór, sum selir nógv best, er Jolly – hálvur litur og hálvur annar litur.

- Parturin av sodavatni í glasfløskum er lutfalsliga lítil í dag, kanska eini 10%, men her er tað aftur Jolly-glasfløskan, sum selir best.

Føroya Bjór hevur ikki somu áskoðan um lønsemi í framleiðsluni av sodavatni sum Restorff's Bryggjarí hevur.

- Vit halda avgjørt, at hetta er ein framleiðsla sum loysir seg, sigur Einar Waag, stjóri, at enda.

Á Føroya Bjór í Klaksvík og kring landið annars eru eini 40 ársverk tilsamans.

# – Vit eru nógv betur »gearaðir« til ølið

**Stjórin á Restorff's Bryggjaríi, Óla Svend Nolsøe, heldur, at Føroya Bjór við Jolly og Sisu nú hevur tveir rættiligar "tungvektarar" á marknaðinum – í kapping við útlendska sodavatnið**

SODAVATN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Óla Svend Nolsøe, stjóri á Restorff's Bryggjaríi, sigur, at tey hava havt eini 15 ymisk sløg av sodavatni, harav Sisu hevur staðið fyri umleið 40% av samlaða umsetninginum av sodavatni.

Hinvegin, sigur hann, at samlaða sølan av sodavatni hjá Restorff's Bryggjaríi snýr seg um eini 15% av øllum umsetninginum hjá felagnum. Tískil er parturin av umsetninginum hjá Restorff's Bryggjaríi, sum stendst av sodavatni, munandi minni enn hjá Føroya Bjór, har hesin parturin liggur um ein helming.

- Kappingin er hørð, og vit hava verið noyddir at framleitt tær stóru fløskurnar uttanlands, meðan Føroya Bjór framleiðir sínar fløskur her heima. Sostatt hava okkara fløskur verið nógv dýrari at keypa enn fløskurnar hjá kappingarneytanum.



*- Tað er ikki upp á tal at selja Restorff's Bryggjarí til Føroya Bjór, sigur Óla Svend Nolsøe, stjóri*

## Loysir seg ikki

Óla Svend sigur, at sambært teimum tølum, sum Restorff's Bryggjarí hevur á borðinum, hevur sodavatnið lítið og einki kastað av sær, og tí avgjørdi felagið nú at selja hendan partin av rættindunum til Føroya Bjór, tá ið hesir vóru sinnaðir at keypa.

- Við hesum hevur bryggjaríið í Klaksvík nú eisini uppaftur betri møguleikar at standa seg í kappingini við útlendska sodavatnið, sum verður selt í Føroyum.

Stjórin á Restorff's Bryggjaríi sigur, at Føroya Bjór við Jolly og Sisu nú hevur tveir rættiligar "tungvektarar" á marknaðinum.

Spurdur, hvørji onnur sløg av sodavatni, sum Restorff's Bryggjarí hevur, hann heldur kundu verið áhugaverd hjá bryggjaríinum í Klaksvík, vísir hann eitt nú á Peru, Assu og Hawaii-sodavatnið.

- Føroya Bjór hevur einki "produkt", sum minnir um Sisu. Hinvegin eru útlendsk sløg, sum kappast við Sisu í Føroyum, eitt nú Faxe Kondi.

Óla Svend sigur, at Føroya Bjór í fyrstu syfti fer at marknaðarføra tey sløg av sodavatni, sum felagið fer at framleiða og selja, við somu etikettum, sum Restorff's Bryggjarí hevur havt á fløskunum.

## Stuttar samráðingar

Vit spurdu eisini Óla Svend, hví hann í telefonini seinasta fríggjamorgun avsannaði, at Restorff's Bryggjarí fór at selja hesi rættindi til Føroya Bjór, tá ið hann í Degi og Viku sama kvøld váttaði, at feløgini høvdu gjørt hesa avtalu.

- Tað var tí, at vit fríggjamorgunin ikki høvdu gjørt nakra avtalu um sølu av rættindum. Avtalan varð nevniliga ikki gjørd fyrr enn seinnapartin fríggjadagin.

Hann sigur, at tá ið leysatíðindi fóru at ganga um søluna uppundir endan av seinastu viku – og fjølmiðlarnir byrjaðu at spyrja og vóru í holt við at skriva um hesi viðurskifti – samdust partarnir um hesa avtalu seinnapartin fríggjadagin og avgjørdu samstundis at almannakunngera hana.

- Vit føldu, at vit vórðu noyddir at handla skjótt, um vit skuldu handla, sigur hann.

## Eingin søla

Óla Svend Nolsø sigur, at leiðslan á Restorff's Bryggjaríi er nógv betur "gearað" til øl-framleiðsluna enn til sodavatnið.

- Nú framleiðslan av sodavatni verður løgd á hillina, hava vit betri møguleikar at gera uppaftur meira burtur úr ølinum.

Spurdur, um tað kann hugsast, at tað næsta, sum hendir, er, at Restorff's Bryggjarí verður selt Føroya Bjór, sigur stjórin, Óla Svend Nolsøe, at enda:

- Nei, hetta hevur slett ikki verið upp á tal, og tað er einki aktuelt um hetta, sigur hann.




*Framleiðsla av sodavatni verður nú søga á Restorff's Bryggjarí*